**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **14/00154**<br>**Umsókn um prinsippielt byggiloyvi matr. nr. 9 í Norðragøtu**<br><br>Irdi og Hans Petersen hava sent kommununi umsókn um prinsippielt byggiloyvi til sethús og vinnulilgan urtagarð á matr. nr. 9 i Norðragøtu. Matrikulin er niðanfrá Luna/Bakkafrost og omanfyri húsini fram við Stallagøtu.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at broyta byggisamtyktina fyri eitt einstakt minni øki til m.a. bústaðarøki, tí at eingin heildarætlan er gjørd fyri henda økispartin, tað er ikki tørvur at leggja økið út til bústaðarøki og samtykt er at varveita økið sum Frílendi.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Irdi og Hans kunnu fáa loyvi at gera og reka vinnuligan urtagarð á matr. nr. 9, men kommunan ber ongan kostna til nýtslu av jørðini, at keypa jørð, gera veg o.t. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskpanarnevndini. |
| 2. | **14/00165**<br>**Uppskot til broyting í byggisamtyktini og býarskipanini fyri økið á Oyruni í Norðragøtu**<br><br>Í sambandi við at Eysturkommuna skal byggja ráðhús á Oyruni í Norðragøta, skal byggisamtyktin og býarskipanin broytast fyri ein partur av økinum. Broytingin fevnir um matr. nr. 188a ið er ogn hjá Eysturkommunu og 25a ið er ogn hjá Føroya Jarðargrunni, økið liggur fram við Eiðisá.<br><br>Ástaðisfundur hevur verið við lokalu náttúrufriðingarnevndini.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at ásetingin fyri økispartin fram við Eiðisá ið er H-Frílendi verður broytt til A-Miðstaðarøki. Nevnda | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

broyting fevnir um matr. nr. 25a og part av188a.

3. **14/00128**

**Umsókn um byggiloyvi – matr. nr. 229/214 í Leirvík**

Gerd Tróndheim hevur keypt neystið á matr. nr. 229, og søkir um byggiloyvi til at gera terassu yvir neystagrundina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Gerd Tróndheim fær loyvi at byggja terassu yvir matr. nr. 229 í Leirvík. Eisini verður mælt til at gera serstaka byggisamtykt fyri ein stóran part av neystaøkinum, ella yvir alt økið sum er lagt út sum áseting G- Neystaøki úti í Bug.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

4. **14/00166**

**Umbøn um tilmæli til frábýti av matr. nr. 62a í Leirvík**

Óli Ólason hevur sent umsókn um tilmæli um frábýti av parti av matr. nr. 62a í Leirvík, matr. nr. 62a liggur inn frá vegnum á Gøtuteigi. Óli hevur fyriskrivað 3 møguleikar til frábýtið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Óli Ólason fær loyvi at gera frábýti sambært uppskoti nr. 1, men verður kunnaður um at áseting fyri økið er Frílendi – H.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

5. **14/00202**

**Endurbygging av ráfiskakjallaranum matr. nr. 29 í Syðrugøtu**

Teknistovan v/Ósbjørn Jacobsen hevur sent fyribils umsókn um at endurbyggja ráfiskakjallarin á matr. nr. 29 í Syðrugøtu.

Sambært byggisamtyktini er økið lagt út sum G2 øki, ið er neystaøki við møguleika fyri serstakari byggisamtykt. Skal umsóknin og verkætlanin fremjast, skal serstøk byggisamtykt gerast fyri økið, umframt hoyring frá, granna/grannum, lokalu náttúrufriðingarnevndini og yvirfriðingarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

*(Hanus Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni)*

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera serstaka byggisamtykt fyri G2 øki í Syðrugøtu.

*(Hanus Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni)*

**6. 13/00070**

**Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu**

Støðutakan til innkomin tilboð. Sum upplýst á seinasta fundi so var væntandi at verandi játtan á 500 t.kr. ikki fór at røkka til. Lægsta tilboðið er á kr. 639.825,99 kr. uttan mvg. Afturat hesum kemur so projektering og eftirlit.

So um tikið verður av lægsta tilboðnum so verður helst neyðugt við eini eykajáttan á 200 – 300 t.kr.

Vinnunevndin mælir til at taka av lægsta fyriliggjandi tilboði og veita eina eykajáttan á kr. 250.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**7. 14/00195**

**Keyp av bili**

Trivnaðarnevndin mælir til at keypa ein bil, og at hesin ikki kostar meira enn kr. 125.000 íroknað mvg. Upphæddin verður tikin av "fríðkan av kommununi"

Fíggjarnevndin mælir til at keypa ein nýggjan bil. Peningurin verður tikin av konto 6.11.32.510. (Fríðkan av kommununi, rakstrarjáttan). Um tørvur er á tí, verður játtanin til konto 6.11.32.510 tikin til viðgerðar seinni.

Einmælt Samtykt at keypa ein nýggjan bil. 125.000,00 kr. verða tiknar av konto 6.11.32.510. (Fríðkan av kommununi, rakstrarjáttan) og rest verður tikið av innistandandi.

**8. 14/00057**

**Umsókn um stuðul – Grót**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. 30.000,00

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-10 (stuðul til mentan)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

*Oluffa Joenen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**9. 14/00498 og 14/00108**

**Umsókn um stuðul – Eldrafelagið Fjallið**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. 40.000,00

Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-10 (stuðul til mentan)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**10. 14/00160**

**Umsókn um stuðul – KFUM – skótanir í Leirvík**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. 40.000,00

Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-10 (stuðul ítrótt)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**11. 14/00151**

**2.viðgerð av eykajáttan til uttanumøkið í Sarpugerði**

Við 1. viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 300.000,00, og at peningurin verður tikin av

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

**12. 14/00150**

**2.viðgerð av eykajáttan til Gjáa**

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð

Við 1. viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 200.000,00, og at peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

**13. 13/00350**

**Umsókn um at ogna sær økið úti á kajuni í Syðrugøtu og at heita á Ósbjørn Jacobsen, um at gera eitt uppskot og kostnaðarmeting av øki til pottar, savna og umstøður til dypparar.**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Málið var fyri í Byggi- og byarskipanarnevndini tann 19. sept. 2013 og var tá mælt til, at arbeiða víðari við málinum, at kanna eftir um eigarir av neystunum vilja selja stykkið . Somuleiðis var samtykt at lýsa hvønn leiklut kommunan hevur, og hvønn leiklut í áhugabólkurin fyri verkætlanini hevur í hesum málinum.

Tekniski leiðarin og formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini hava tosa við áhugabólkin fyri at fáa lýst ætlanina við pottunum, hitahjalli v.m.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 23. apríl 2014, og mælir til at kommunan keypir økið úti á kajuni í Syðrugøtu sum avrátt er. Síðani verður arbeitt víðari við málinum og formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini tekniski leiðarin fáa lýst málið og verkætlanina neyvari við dialogi við arbeiðsbólkin. Eisini verður mælt til at leggja flísar á økið í niðaru síðu sum Byggi- og býarskipanarnevndini vísti á í 2013 og biðja Teknistovuna seta arbeiðið í gongd beinanvegin. Tað ið er eftir av játtanini verður brúkt til

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

prosjektering.

Fíggjarnevndin mælir til at kommunan keypir økið úti á kajuni í Syðrugøtu sum avrátt er. Málið viðv. flísum á økið í niðaru síðu, verður tikið uppaftur til viðgerðar, tá støða verður tikin til samlaðu loysnina viðv. Syðrugøtusandi.

**14.** **14/00170**

**Leirvíkar skúli – útbjóðing av út- og umbygging av skúlaplássinum í Leirvík**

Støðutakan til útbjóðing av arbeiðinum at gera spæliplássið í skúlagarðinum í Leirvík. Á fíggjarætlanini er 1. mió. kr. avsett til arbeiðið. Byggi og býarskipanarnevndin mælir til at gera skúlaplássið sambært fyriliggjandi tekningum og at skúlagarðurin garðurin eisini fær amfir og spælihylin gjørdan nú, tí tað verður munandi dýrari at gera jørðarbeiðið til amfir og spælihylin seinni.

Verandi játtan røkkur ikki til arbeiðið og tí verður mælt til at veita eykajáttan eykajáttan á kr. 200.000,00 til omanfyri nevnda arbeiði.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

**Býráðsfundur mikudagin 30. apríl 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________